Dagur: 08. apríl 2002

Skrátal: 31311

Máltal: 020448/2

# Reglur um nýtslu av teldu til skrivligu fráfaringarroyndir fólkaskúlans

Við heimild í § 48 í kunngerð nr. 157 frá 16. juli 1993 um fráfaringarroyndir fólkaskúlans verða hesar reglur settar upp fyri nýtslu av teldu í sambandi við skrivligu fráfaringarroyndir fólkaskúlans:

**§ 1.** Avgerðin um at nýta teldu til fráfaringarroyndirnar í føroyskari og danskari framseting verður tikin í samráði við næmingar og foreldur.

**§ 2**. Próvtakararnir skulu vera vanir at nýta telduna í dagligu undirvísingini.

**§ 3.** Próvtakararnir skulu hava møguleika fyri at velja, antin teir vilja nýta teldu til innskriving av endaliga royndaravrikinum, ella teir vilja skriva inn við haldgóðari handskrift. Lærarin skal geva hvørjum einstøkum næmingi vegleiðing, áðrenn henda avgerðin verður tikin.

**§ 4.** Próvtakararnir skulu nýta teldur skúlans. Áðrenn royndina skulu teldurnar, ið verða nýttar, verða settar upp soleiðis, at tað ikki ber til hjá próvtakarunum at lesa tekstin á skíggjanum hjá hvørjum øðrum. Gott pláss skal eisini vera ímillum hvønn einstakan próvtakara.

**§ 5.** Loyvt verður at nýta eina vanliga tekstviðgerð við rættstavara. Próvtakararnir skulu ikki hava atgongd til onnur telduforrit undir royndini. Viðvíkjandi orðabókum og hjálparamboðum annars verður víst til kunngerðina um fráfaringarroyndir fólkaskúlans í føroyskari og danskari framseting.
Stk 2. Próvtakari, sum brýtur omanfyri nevndu reglur, skal verða vístur burtur frá royndini beinanvegin.

**§ 6.** Í minsta lagi eitt av umsjónarfólkunum skal vera teldukønt, eisini um tað bert er einans næmingur, ið tekur av tilboðnum um at nýta teldu til royndina.

**§ 7**. Meðan royndin er, skulu próvtakararnir hava møguleika fyri at nýta prentara til útskriving, um teir ynskja tað. Eitt av umsjónarfólkunum skal hava ábyrgdina av at flýggja próvtakarunum tað, sum teir prenta. Skúlin ansar eftir, at eingin próvtakari verður órógvaður av hesum.

**§ 8**. Tá ásetta royndartíðin er farin, skal avrikið verða liðugt prentað á pappír. Próvtakarar, sum nýta teldu til royndina, fáa somu tíð, sum teir, ið ikki nýta teldu.

**§ 9.** Allar síðurnar í prentaða próvtøkuavritinum skulu hava hesar ásetingar, antin ovast ella niðast á hvørjari síðu:

- • Návn og nummar (ella forbókstavir) á próvtakara.
- Navn á skúlanum
- Royndarslag
- Navn á flokki
- Navn á umsjónarfólki

Stk 2. Tá ið próvtøkuavrikið verður latið inn, skal próvtakarin seta sína undirskrift á hvørt einstakt ark. Eitt av umsjónarfólkunum skrivar sítt navn á fyrstu síðu.

**§ 10.** Verða disklar nýttir, skal skúlaleiðarin tryggja sær, at hesir eru tómir, áðrenn teir verða flýggjaðir

næmingunum, tá ið próvtøkan byrjar. Disklarnir -mugu ikki verða fluttir úr royndarhølinum, meðan royndin fer fram, og skulu latast umsjónarfólkunum saman við avrikinum. Disklarnir skulu goymast saman við avrikinum smb. kunngerð um fráfaringaroyndir fólkaskúlans § 13, stk. 4. Disklarnir kunnu ikki nýtast sum kladda ella sum skjalprógv fyri tí, sum skuldi verið latið inn.

**§ 11.** Verður streymslit ella verða aðrir trupulleikar við teldunum, sum ikki kunnu rættast, so verður hildið fram uttan teldur. Hetta skal kunngerast næmingunum, áðrenn teir velja smb. § 3.

**§ 12.** Um trupulleikarnir eru so stórir, at próvtøkan ikki kann halda fram, setir skúlin seg í samband við Mentamálastýrið/Fólkaskúladeildina beinanvegin.

**§ 13.** Til próvtalsgevingina í røkjuskapi verður gjørd serstøk vegleiðing.

Mentamálastýrið, 8. apríl 2002

Olaus Jespersen
*deildarstjóri*